# TÍÐINDI

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 34180

# Grótlistamaðurin í Fuglafirði

**Frits Johannesen í Fuglafirði hugleiðir um grótlistamann í Fuglafirði**

GRÓTLAÐING
*Orð og myndir:*
*Frits Johannesen*


*Regin Jóanesarsson, grótlistamaður*


*Regin og Gunnleif Thomsen, hjálparmaður hansara*


*Hetta er millum stórstu avrik, ið Fuglafjarðar kommuna hevur latið gjørt tey seinastu árini*

Gongur tú niðan eftir Tróndabrekku í Fuglafirði, sært tú ein grótlistamann og hjálpara hansara standa í lítla stykkinum hjá Olivinu hjá Eiðis Kristiani og skapa eina listaliga lund úr gróti og steini. Grótlaðarin er Regin Jóanesarson, og hjálparmaður hansara er Gunnleif Thomsen. Her stóð fyrr eitt lítið høsnarhús, og vuksu eini trý, fýra stór trø og nakrir runnar í hesari heimsins minstu viðalund. Bert eitt træ er eftir frá hesum døgum. Kring træið hava Regin og Gunnleif skapað ein listaligan blett í bygdini. Ja, vit kundu kalla hetta fyri rúmlist við laðaðum garði, veggi og einari lítlari rás, ið ringir seg eitt lítið sindur millum steinsettan vegg, steinakant og fram við gamla trænum. Hetta er sælt fyr eygað at sjá.

Regin hevur nú í nøkur ár gjørt grótlaðingar kring í bygdini. Alt er sonn list. Nú er hetta, sum her verður umrøtt, ikki liðugt enn, men hetta verður ein listalig perla. Hetta er ein "installatión" undir fríum lofti - eitt slag av "Landart", men lat okkum bara kalla hetta fyri listaverk av Regini Jóanesarson.

### Toftatún

Í Toftatúni í Fuglafirði stendur ein grótlaðing eisini úr Jóanesar hond. Hetta er ein skygging av einari gamlari, fornari føroyskari mentan. Kring oyggjarnar eru nógvir vakrir grótgarðar - eingjargarðar, garðar millum hagapartar, viðtøkugarðar, garðar húsanna millum og á grundstykkjum út ímóti alfaravegi. Tað er ein hópur av orðum, ið tulka hugtakið garður, og ikki so fá orð hava steinlaðing í sínum kroppi. Hvør steinur í hesum laðingum er eitt listaverk og hevur sína sál. Verður farið undir at tilevna steinar og grót og fáa tað at sampakka við annað grót og grýti, verður sálareyðkenni tess eitt symfoniskt ljóð úr livandi deyðum steinum, sum ein dag eru komnir úr tí fjaru rúmd fyri milliónum av árum síðani. Ja, og ótrúligt er tað, at eitt dism av hesum gróti endar í Tronganum í Fuglafirði.

Grótmúrurin í Toftatúni er ein varði og stendur sum ein skaldakendur veggur um gott handverk og listasmíð úr gróti og minnir okkum á, at soleiðis eigur ein múrur at taka seg út og ikki seta skilna millum fólk. Tað hava vit sæð t. d. við Berlinmúrinum. Hvat skulu vit halda um múrin, sum nú verður reistur millum ísraelittar og palistinensar úr køldum, lívleysum sementi? Her verður torført at ganga i samgongu. Partur av Berlinmúrinum hevur fingið annað eyðkenni. Tað lívleysa, litleysa sementi, sum eftir stendur, hevur nú fingið litkorn í kríllin, so hetta er nú vorðið eitt listaverk .

Kanska ein dag fer miðeysturmúrurin at sortna burtur, og partur av honum fær ein klump frá t. d. Profa á sítt kalda hold, so annar andi verður yvir hesum rótleysa skapi. Nei, ólíka er skapandi hond Jóanesar og grótlaðing hansara í Toftatúni. Hetta er millum stórstu avrik, ið Fuglafjarðar kommuna hevur latið gjørt tey seinastu árini, og takk fái hon fyri tað. Annars vil eg her bera Jóanesi, grótlistamanni og hjálparmanni hansara, Gunnleifi, stóra tøkk fyri avrik teirra og ynski teimum gleðilig jól og eydnuberandi nýggjár.

Avgreiðslutíðir um jólini



Frá 27. til 29. desember 2006
eru avgreiðslutíðir okkara broyttar.

Móttøkurnar hava opið og telefonirnar verða tiknar hesar dagar frá kl. 10 til kl. 12.

Frá týsdegnum 2. januar 2007 verður opið aftur sum vanligt allar yrkadagar frá kl. 9 til kl. 15.

Sí annars www.almannastovan.fo

HTM | almannastovan

Tórshavn · Tinghúsveg 14
Postrúm 3096 · 110 Tórshavn
Tel 35 35 70 · Faks 35 35 71

Norðoyggjar · Klaksvíksvegur 78A
Postrúm 296 · 700 Klaksvík
Tel 45 72 40 · Faks 45 72 41

Eysturoy · Heiðavegur
Postrúm 224 · 600 Saltangará
Tel 47 47 10 · Faks 47 47 11

Suðuroy
Postrúm 58 · 800 Tvøroyri
Tel 35 35 60 · Faks 35 35 61